# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

**Føðingar**



1. juli fingu Lív Danielsen og Vinjard Dam, Hvalvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3100 gr.



26. juni fingu Heidi Davidsen og Regin Johannessen Tórshavn, eina dóttur, hon var 56 cm og vigaði 3650 g



8. juli fingu Elna Høgenni, Kaldbak og John André Poulsen, Vágur ein son. Hann vigaði 3650 g. og 54 cm langur.

30. juni fingu Guðrun Maria Mortensen, Tórshavn og Torkil Vestergaard Rasmussen, Tórshavn ein son. Hann vigaði 3982 gr og var 57 cm langur.

9. juli fingu Jütta og Jógvan Reynslág, Argir, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4200 gr.

10. juli fingu Malan og Trúgvi Lützen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3900 gr.

10. juli fingu Heidi Fjallstein og Suni Dam, Hoyvík, tvíburar - gentu og drong. Drongurin var 46 cm. langur og vigaði 2375 gr. og gentan var 45 cm. long og vigaði 2200 gr.

11. juli fingu Anna Söderlund og Eirikur Hansen, Argir, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3700 gr.

11. juli fingu Jórun S. Ludvig og Jóan Pauli Vilhelmsen, Hoyvík, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3350 gr.

13. juli fingu Ásta þ Borgarðlíð, Tórshavn og Eirikur Elisson, Funningsfjørður, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 2700 gr.

13. juli fingu Anna Elisabeth og Jóhannes Eir Guðjónsson, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3350 gr.

13. juli fingu Annilisa Klevang Eikhólm og John Eikholm, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3000 gr.

14. juli fingu Helga Johnsdóttir og Heri Hentze, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4870 gr.

14. juli fingu Eyðfríð og Jóhan Hendrik Vík, Haldórsvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3400 gr.

14. juli fingu Malan og Dávur Johansen, Streymnes, eina dóttur. Hon var 52 cm.long og vigaði 2950 gr.

16. juli fingu Malan Eysturoy og Olaf Poulsen, Argir, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 2900 gr.



3. juli hevur Anna Louisa Jacobsen lokið prógv sum Bachelor of Science í biokemi á University of Aberdeen.



9. juli 2008 fekk Tórstein Christiansen, Skálavík, prógv við Queen Mararet University í Edinburgh í Skotlandi sum Bachelor í Tourism Management. Prógvið er tikið við útmerkilsi (distinction). Frammanundan er Tórstein útbúgvin Serviceøkonom frá HRS í Keypmannahavn.

# Emmy Joensen stjórna Sernámsdeplinum



Mentamálaráðið hevur frá 4. august 2008 sett Emmy Joensen, fulltrúa í Mentamálaráðnum, sum virkandi stjóra í Sernámsdeplinum til 1. november 2008, tá væntandi nýggjur stjóri verður settur.

Starvið sum stjóri í Sernámsdeplinum verður lýst leyst í seinnu helvt av august mánaði.

Emmy Joensen hevur starvast sum fulltrúi í Mentamálaráðnum síðan 2002. Eisini hevur Emmy starvast sum skúlastjóri í Miðvágs/Sandavágs Skúla í 10 ár.







**Prógv**

3. juli vardi Helga Ellingsgard PhD ritgerðina »Interleukin-6 Regulation of the Pancreatic Islet« á Náttúruvísindaliga Fakultetinum á Lærda Háskúlanum í Zurich.

28. juni hevur Magnus Fuglø, Hvalvík, lokið prógv sum sivilverkfrøðingur í konstruktiónsteknik á Syddansk Universitet.

Durita Larsen, Tvøroyri, fekk 26. juni prógv sum ergoterapeut frá Ergoterapeutuddanelsen í Keypmannahavn

**Brúdleyp**

Leygardagin 19. juli kl. 14.30 giftast í Gøtu kirkju Sunrid Gleðisheygg, Syðrugøta og Ólavur Nielsen, Saltangará. Brúdleypið verður hildið fyri innbodnum í Sjókaféini í Runavík.

Leygardagin 19. juli giftast Maria Yao Jørgensen og Hjørleif Klein í Godthåbs kirke. Brúdleyps adressan er Brigadevej 18, København S

Leygardagin 19. juli kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Randi Olsen, Tórshavn og Richard Magnus Jacobsen, Klaksvík. Veitslan verður hildin á Hotel Føroyum fyri innbodnum.

Leygardagin 19. juli. kl.15.00 giftast í Funnings kirkju. Gunnvør Fríðhild Juul. (Eiði) og Jógvan Olivur Kallsoy. (Eiði). Nátturði verður í Eb-húsinum á Eiði frá kl.18.30 Øll eru hjártaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**

Í morgin 19. juli hava hjúnini Anna og Tróndur Húsgarð gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

Leygardagin t. 19/7 hava Poula og Niels Simonsen, á Ternuryggi, Tórshavn, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Mikladali saman við familjuni.

**60 ár**

Sunnudagin 20. juli verður Sverri Hansen, Norðragøta, 60 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 19. juli. Øll eru hjartaliga vælkomin.



Leygardagin 19. juli giftast Aleth N. Lamhauge og Steingrím H. Mikkelsen úr Tórshavn. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 16.30. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00.



Leygardagin tann 19. juli kl 15 giftast í Porkeris kirkju Sirið Hansen úr Porkeri og Ragnar Groth Mortensen úr Øravík. Veitslan verður fyri innbodnum í Gistingarhúsinum í Øravík kl. 19.00.



***Vit skulu giftast!***

Fríggjadagin 18. juli kl. 14 giftast í Ebenezer Ingunn F. Durhuus úr Tórshavn og Eirikur Norðberg úr Vági. Eftir vígsluna verður ein drekkamuður. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.



Leygardagin 19. juli kl. 15 giftast í Dómkirkjuni Birita Thomsen úr Hoyvík og Høgni Tausen úr Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.